## Danmark vann EM

Fyri áttandu ferð á rað er Danmark Europa-meistari í badminton fyri lið. Tað stóð tó nógv á í finaluni móti Onglandi, sum var á odda 2-0 eftir teir báðar fyrstu dystirnar. Tað eydnaðist to Tine Rasmussen (myndin) at vinna kvinnu-singluna. Carsten Mogensen og Mathias Boe vunnu harra-doubluna, og loksins vunnu Kamilla Rytter Jul og Maria Røpke eisini kvinnudoubluna, soleiðis at Danmark vann dystin 3-2.



## Inter vil hava Agger

Sambært enskum miðlum vil italska Inter nú hava danska Daniel Agger. Tað hevur ljóðað, at bæði Milan og Real Madrid hava roynt at fingið fatur á spælaranum, sum hevur havt ilt við at vinna sær fast pláss hjá Liverpool í ár. Sambært enskum miðlum vil Inter longu nú fáa handilin í hús, soleiðis at soleiðis at grannarnir úr Milan ikki gerast partur av eini kappbjóðing móti sumri.

# Klárt betri, tá tað koyrdi hjá okkum



Ein av mest eyðsýndu ÍF-spælarunum í mansfinaluni, var Rúni Weihe, sum við áhaldandi smasjum bjóðaði SÍ av. Hóast hann er fegin um steypasigurin og harvið eisini greipuna, helt hann stóran part av mansfinaluni vera ov nógv merktan av feilum.

– Sum vit sóu tað í tveimum av settunum, var týðiligur munur á liðunum, tá vit fingu okkara spæl at koyra. Men yvirhøvur var dysturin merktur av ótrúliga nógvum feilum, bæði persónligum og ópressaðum feilum. Tað er eitt sindur keðiligt, tí tað gongur út yvir spælið, sigur Rúni.

– Men tá vit fingu meira ferð á, gjørdist tað rímiliga klárt. Serliga tey bæði seinnu settini fingu vit blokkin at koyra væl, og tá sóu vit heldur ikki teir feilirnar, sum vóru at síggja í teimum báðum fyrru settunum. Tað, sum gjørdi munin, var at vit fingu blokkin at koyra og fingu servurnar at rigga.

Tá liðið hjá fuglfirðingum fór á vøllin leygardagin, var tað við góðum sjálvsáliti í viðførinum, tí eina viku frammanundan hevði ÍF vunnið meistaraheitið – enntá við dystum eftir at spæla. Og Rúni Weihe dylir heldur ikki, at teir í ÍF kunnu vera stak væl nøgdir við gongdina í vetur.

– At vinna tað, ið vinnast kann, er tað, vit hava vant fram ímóti, so kenslan verður ikki betri enn tað sama. Vit hava verið eitt sindur upp og niður, men hava allíkavæl verið góðir, tá vit hava verið noyddir at vera góðir. Tað er helst tað, sum í vetur hevur verið munurin á teimum bestu og teimum góðu, sigur Rúni Weihe.

**-hil**



*Greipuvinnarar í mansflogbólti í 2009. ÍF*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Bólturin ferðast skjótari



Áslakkur Reinert Petersen átti fyrstu servuna í mansfinaluni. Hon kiksaði, men tað var ikki tann einasta, og tað mundi valla heldur vera nakar servari á vøllinum í mansfinaluni, sum leygardagin slapp undan at gera servufeil. Tað gjørdist næstan eitt eyðkenni fyri dystin…

– Ja, har vóru nógv servukiks hjá báðum liðum, og kanska er tað hesin nýggi bólturin, sum hevur eitt sindur við tað at gera. Hann ferðast skjótari og fer longri av tí sama. Um tú slært hann rætt, hongur hann betur í luftini, og tá hann so kemur niður, er hann torførur at taka ímóti, sigur Áslakkur, ið annars helt finalusigurin hjá teimum í ÍF vera fult uppiborinan.

– Hetta er øgiliga deiligt, og eg haldi eisini, at vit vóru betri enn teir í dag. Hetta er tað, vit stríðast fyri, og tá tað so gjørdist greipan í vetur, er tað bara uppaftur betri. Eg haldi, at vit spældu upp á meira, umframt at vit stóðu væl í blokkinum og høvdu betri álop. Eg haldi, at vit vóru allir góðir í dag.

**-hil**



*Sum tað sømir seg einum gullvinnara, fekk Boban Ilic ein ordans lufttúr, tá steypasigurin var veruleiki*
*Mynd: Álvur Haraldsen*